## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Eigil Gunnarsson 85 ár

Fríggjadagin 28. januar 2005 fylti Eigil Gunnarsson í Havn 85 ár.

Eigil er føddur og uppvaksin í Vági.

Foreldrini, Inga, f. Jacobsen, og Gunnar Danielsen, vóru bæði ættað úr Søldarfirði, men fluttu umleið 1915 til Vágs. Gunnar var skipari og sigldi út frá Vági. Hann var beiggi Victor Danielsen trúboðara.

Eldru systrarnar Anna Malena (Lena), og Sunneva Maria (Mia) vóru báðar føddar í Søldarfirði, meðan dreingirnir Gunnar, Tryggve, Eigil og Ingolf, vóru føddir í Vági.

Systkini høvdu Danielsen til eftirnavn til 1934, tá tey skiftu til Gunnarsson.

Eigil var sum ungur til skips við pápanum sum skipara, og í 1940 flutti hann til Havnar, har hýruvognskoyring bleiv hansara lívsstarv.

Hann keypti sær ein lastbil og koyrdi lastvognskoyring í Havn eina tíð, áðrenn hann keypti sær sín fyrsta hýruvogn og koyrdi á bilstøðini hjá Hugo Øster.

Seinni fór hann at koyra í Taxa í Lucas Debesargøtu, og var hann ein av stovnarunum av P/F Taxa í 1952,



sum í 1955 skifti navn til P/F Auto.

Hann var fyrsti nevndarformaður á støðini og sat í nevndini í mong ár.

Hann koyrdi í Auto, til hann varð 76 ára gamal í 1996, við undantak av árunum frá 1970-78, tá hann passaði bensin- og oljusøluna á støðini.

Eigil giftist í 1951 við Jenny, f. Mikkelsen, av Toftum, dóttir Annu Elisabeth og Magnus F. Mikkelsen, av Toftum. Tey fluttu í nýggj hús við Dalavegin í Havn og fingu tíggjar synir: Magnus í 1952, Gunnar í 1956, og Regin í 1960.

Magnus er giftur við Birgitte, f. Viderø, av Viðareiði, og Gunnar er giftur við Berit, f. Wolles Jensen, úr Havn, teir báðir búgva í Havn, meðan Regin, ið er giftur við Birnu, f. Tyril, úr Norðragøtu, býr í Kollafirði. Abbabørnini hjá Eigil eru átta í tali.

Jenny og Eigil búðu við Dalavegin til síðst í 80-unum, tá tey fluttu niðan í Børkugøtu. Miðskeiðis í 90-unum gjørdist Jenny sjúk og doyði í 1999, 74 ára gomul.

Hóast Eigil er ein stillur og róligur maður, dámar honum væl at koma út millum fólk.

Hann koyrir bil sjálvur og kemur ofta til ymisk tiltøk og til møtir í Ebenezer og Lívdini í Hoyvík. Eisini gongur hann túrar, serliga á Skálatrøð í Vágsbotni.



# Tær flyta fyri Almannastovuna

**- Her eru sera góðar umstøður. Og vit gleða okkum at sleppa til arbeiðis aftur, siga tær báðar Thurid og Margit**

FLYTING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Allan fríggjadagin og um vikuskiftið hava tær báðar, Thurid og Margit, og ein rúgva av øðrum starvsfólkum á Almannastovuni, arbeitt við at flyta niðan í nýggju hølini á Smyrilsvegi.

Tað eru altíð ein hópur av skjølum og tílíkum, sum skal við, tá ein soleiðis flytur við - og fyri - ein slíkan stovn sum Almannastovuna. Men hóast alt hetta fyllir nógv í vavi, og alt skal setast uppá sítt rætta pláss aftur, so var virksemið á stovninum fult í gongd aftur fyrrapartin í gjár.

Tað er tó kortini ikki alt virksemið á Almannastovuni sum er flutt í bygningin, har Brunatryggingin helt til í síni tíð. Umsitingin er flutt hagar, saman við stjóranum Petru J. Joensen. Somuleiðis eru tvær av deildunum fluttar niðan í nýggju hølini.

Íalt eru 49 fólk nú til arbeiðis í Almannastovuni á Smyrilsvegi.

## Minningarorð um
# Einar Olgeirsson

Tann 29. desember varð Einar heimkallaður, bert 62 ára gamal.

Einar var føddur 27. januar 1942 á Akureyri í Íslandi og kom hann til Føroya, tá byrjað varð at borað í Lopra, har hann kom at kenna Marin, sum seinni kom at verða kona hansara.

Eftir stutta tíð flutti Einar til Vestmanna, har hann fór at arbeiða sum timburmaður. Vit byrjaðu báðir sama dag at arbeiða hjá einum byggifelag her í bygdini, og har komu vit at kennast sera væl.

Vit arbeiddu saman næstan øll árini til tær ringu tíðirnar komu, tá leið okkara gekk til Berlin í Týsklandi, har vóru vit eisini saman eina tíð. Eftir at vit vóru heimafturkomnir, hava vit í styttri og longri tíð arbeitt saman aftur, og hava vit havt nógvar góðar og hugnaligar løtur saman, eisini inni hjá tykkum, har Marin altíð var klár við kaffikannuni og onkrum góðum afturvið. Einar var sera skemingarsamur og setti hann lív í har hann var. Hann var ein álítandi maður og vildi øllum tað besta. Var eg til gongu, ella koyrdi fram við heiminum hjá tykkum báðum, og Einar



sat við vindeygað, so fall altíð ein heilsan okkara millum.

Triðja jóladag ringdi eg oman til Einar og tosaðu vit um arbeiðið, sum vit skuldu gera saman eftir nýggjár. Seinastu orðini, ið hann segði áðrenn hornið bleiv lagt á vóru, vit hoyrast. Men hetta skuldi bara ikki verða so. Ein stendur spyrjandi, men sum orðatakið sigur: eingin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldi gistir. Hetta kann enn einaferð staðfestast.

Vit, sum kendu Einar, hava mist nógv, nú hann er farin, men størstur er missurin hjá tær Marin, børnunum og Karim, má Harrin styrkja teg og tíni í sorgini, nú Einar ikki er millum okkara longur.

*Tað fuglaberg, sum fyrr var bygt,*
*tað er nú tómt og oyði,*
*har ikki sæst eitt fuglakykt,*
*ei heldur meir á heiði.*

*Og eina ferð vit fáa boð,*
*tá síðstu ferð vit anda.*
*Úr heiminum vit fara so,*
*hjá tær um ævir standa.*

Við hesum orðum lýsa vit frið yvir minnið um Einar Olgeirson.

**Jákup Hendrik**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæri farbróðir okkara

**Hans Andreas Fr. Hansen**
**vanliga nevndur Dia**
**á Kinn í Lamba**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
fríggjadagin 28. januar, 85 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum týsdagin kl. 17.00
í Glyvra kirkju.
Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jákup**